MÁLRÁÐIÐ

# FRÁGREIÐING

## UM MÁLRÁÐIÐ VIRKAR EFTIR LÓGINI UM MÁLRÁÐ

# Innihald

Úrtak við niðurstøðu 4
Samandráttur av tilmælum 5
Fororð 8
Arbeiðssetningur 10
1.0 Hvussu virkar Málráðið sbrt. endamálinum í § 2? 11
2.0 Hvussu verður arbeitt við uppgávunum sbrt. §§ 5-7? 14
3.0 Samstarv við aðrar viðkomandi partar 15
4.0 Samstarv við Staðarnavnanevndina og Navnanevndina 17
5.0 Hvussu virkar skipanin við Málráði, t.e. umboðsráði og starvsnevnd? 18
6.0 Skrivstovu- og fundarhald 20
7.0 Niðurstøða um, hvørt lóg um málráð virkar eftir ætlan 21
8.0 Onnur viðurskifti av týdningi 22
2024 verður árið … 24

# Úrtak við niðurstøðu

Partar av lógini um málráð virka, serliga § 2. Eisini stk. 2 og 3 í § 5 hava virkað heilt hampiligt, men stk. 4 og 5 og § 6 hava ligið og bíðað. Tað er sjálvsagt ikki gott.

Teknmálsarbeiðið við SignWiki er gjørt við støði í § 2, men vit høvdu viljað, at føroyskt teknmál fekk mun-andi betri umstøður, bæði viðvíkjandi fígging, arbeiðsmegi og gransking.

Aðrir partar av lógini um málráð og samstarv virka eisini, men aloftast á óformligum stigi, og tað má broytast og skipast betur. Tað gerst m.a. við styrktari fyrisiting, mannagongdum o.t., sum eingin hevur havt formligu ábyrgdina av higartil. Vend má koma í sum skjótast.

Forfólkið hevur dagligu ábyrgdina sum umsjónarfólk, men eingin veit reiðiliga, hvat tann uppgávan inniber, og tykist hon stava frá Føroysku málnevndini, sum fór í søguna fyri meira enn 10 árum síðan. Set stjóra og fá dagliga leiðslu inn á stovnin, so arbeitt verður miðvíst við ráðlegging og málseting.

Lógin um málráð skuldi kanska verið gjørd sum rammulóg við kunngerðum, sum Málráðið, Navnanevndin og Staðar-navnanevndin virka eftir. Sum er virkar Staðarnavnanevndin eftir reglugerð og hini eftir lóg.

Felags fyrisiting ber helst til, men læringin av umleggingini frá Føroyskari málnevnd til Føroyskt málráð má vera, at tað má fyrireikast og skipast væl við neyðugari fíggjar- og arbeiðsorku, soleiðis at vit fáa virkað sum almennur stovnur, ið sýnir góðan fyrisitingarsið og heldur landsins lógir, eitt nú lógina um alment innlit. Við veiku fyrisiting okkara, starvsfólkamissi og vantandi mannagongdum til tess at tryggja stovninum varandi vitan og førleikar hevur Málráðið/Málstovan ikki í nøkt-andi mun kunnað hildið hesar treytir, og harmast vit um tað.



# Samandráttur av tilmælum

## 1.0 HVUSSU VIRKAR MÁLRÁÐIÐ SBRT. ENDAMÁLINUM Í § 2?

**Tilmæli:** Set orku av, arbeiðsorku og fíggjarorku, so vit við føroyskum máli kunnu ganga globalisering og talgildum frambrotum á møti. Vit mugu hava málpolitikk og ætlanir fyri føroyskt sum annaðmál í skúla- og arbeiðshøpi. Føroyskt teknmál eigur somuleiðis at fáa munandi meira fíggjar- og arbeiðsorku, so granskað kann verða í teknmálum, umframt at deyv, hoyri-brekað og avvarðandi teirra kunnu fáa egið teknmálsráð ella í minsta lagi tekn-málsráðgeva og -samskipara.

**Tilmæli:** Játta meiri fígging, so vit kunnu styrkja okkara ráðgevandi og vegleiðandi funktión og leggja um til arbeiðslag, ið tíðin krevur av okkum. Eina sterka umsiting, so vit fáa hildið lógina um innlit og sýnt góðan tænastu-sið. So stovnurin virkar sum sjálvstøðug skipan, ið tolir, at starvsfólk koma og fara. Vit virka so smátt eftir hesum, men tað er meira orsakað av treiskni og vilja; tann motivatiónin heldur ikki í allar ævir. Vandin fyri, at fólk verða slitin niður, er avgjørt til staðar.

**Tilmæli:** Játta meiri fígging, sí tilmæli undir pkt. 2 s. 12. Umhugsa eitt málráð við øðrum bygnaði og aðrari funktión. Fleiri møguleikar eru. Vita, hvat grannalondini gera, og hvat riggar har. Set ein bólk at kanna hetta og gera tilmæli, sum verður fylgt.

## 2.0 HVUSSU VERÐUR ARBEITT VIÐ UPPGÁV-UNUM SBRT. §§ 5-7?

**Tilmæli:** Avgjørt neyðugt við stjórasetan og dagligari leiðslu á staðnum og hægri ársnormi (í *Málmørkum* (2007) var víst á, at stovnurin í øllum førum skuldi hava fimm ársverk, og tá var fyrisiting ikki roknað uppí).

## 3.0 SAMSTARV VIÐ AÐRAR VIÐKOMANDI PARTAR

**Tilmæli:** Set stjóra, sum stendur á odda fyri ráðlegging og málseting vegna Málstovuna og Málráðið og í samstarvi við eitt nú Føroyamálsdeildina, Náms-vísindadeildina, Fróðskaparsetrið í síni heild og onnur viðkomandi. Vit mugu koma burt frá leiðsluloysi og tilvild-arligum óformligum starvi sum ráðandi samstarvi. Óformligt samstarv er kreativt, innovativt og bæði vælkomið og kærkomið, men skal undir ongum umstøðum standa einsamalt.

**Tilmæli:** Set skikkað fólk at siga og meta um, hvørt tað ber til at gera reglur um Málráð, Staðarnavnavend og Navnanevnd. Spyr um fyrisiting og løggilding (Staðarnavnanevndin) fyri at fáa nóg gott metingargrundarlag um fígging, fyrisitingarførleika, hølisumstøður o.t.

**Tilmæli:** set stjóra, sum saman við málfrøðingunum á Málstovuni, umboðar stovnin í viðkomandi netverkum og samstørvum. Forfólk ella aðrir málráðslimir, sum mugu fíggja slíka umboðan við lønar- ella frítíðarmissi, eiga at fáa fult viðurlag. Alt annað er burturvið.

## 4.0 SAMSTARV VIÐ STAÐARNAVNANEVNDINA OG NAVNANEVNDINA

**Tilmæli:** Fá skikkað fólk at meta um, um tað ber til at gera rammulóg fyri Málráð, Staðarnavnanevnd og Navnanevnd. Tak undir hesum eisini støðu til, hvørjum støðu hvørjum aðalráð/landsstýrisfólki slíkur stovnur eigur at vera undir, hvør kærumyndugleikin skal vera, og hvussu ein frægast kemur burtur úr iva um gegni. Tryggja honum nøktandi fyrisiting, undir hesum skikkað starvsfólk, hóskandi høli og nøktandi fígging. Felags umsiting kundi lagt upp til áhugavert fakligt umhvørvi, men neyðugt er við stjóra og eini væl skipaðari organisatión við greiðum samskiftisleiðum og mannagongdum.

## 5.0 HVUSSU VIRKAR SKIPANIN VIÐ MÁLRÁÐI, T.E. UMBOÐSRÁÐI OG STARVSNEVND?

**Tilmæli:** Sum heild tekur verandi Málráð undir við, at frægari hevði verið við títtari fundum, størri ávirkan og meira innliti. Kanska skulu vit tora at ofra nakrar limir til frama fyri ynskinum um ávirkan og innlit og javnan minna limirnar á at hugsa fólkaræðisligt og samfelagsumboðandi.

**Tilmæli:** Tað er umráðandi, at Málráðið er mannað við málfrøðingum og málkønum og málhugaðum fólki. Hóast stovnurin fær stjóra er neyðugt við virðiligari samsýning til forfólkini, tí samsvar eigur at vera millum útbúgvingarkrøv og samsýning.

**Tilmæli:** Limir eiga at kunna sita longur, tí tað tryggjar Málráðnum stabilitet og varandi vitan.

Sum er, eru somu stovnar altíð umboðaðir, men limir kunnu ikki sita longur enn tvær setur, t.v.s. tvær ferðir fýra ár. Tað er kanska hóskandi, men havast má í huga, at talið á málfrøðingum at taka av ikki er so stórt. Er starvið hugaligt og meiningsfult, er lætt at manna sessirnar – og øvut.



## 6.0 SKRIVSTOVU- OG FUNDARHALD

**Tilmæli:** Viðvíkjandi vantandi ávirkan á málráðsarbeiði orsakað av fáum málráðsfundum mugu vit bara siga, at vit skilja atfinningina, men fáa ikki gjørt so nógv við tað annað enn at mæla til at leggja starvsnevnd og málráð saman og enda á t.d. 7 limum, sum møguliga kunnu umboða eitt toymi, ið umboðar málsliga sergrein ella málbólk, t.d. føroyskt undirvísingarmál, miðlamál ella føroyskt sum annaðmál.

Hin loysnin er at seta eitt breitt málráð uttan avgerðarrætt, men við møguleika at verða hoyrt og kunna gera tilmæli, sí pkt. 3 á s. 13-14.

**Tilmæli:** Hægri játtan, so vit fáa lønt stjóra fulla tíð og fyrisitingarfólkinum 0,75 heldur enn 0,5, sum er verandi støða.

**Tilmæli:** Daglig leiðsla við stjóra fulla tíð. Stjórin kann væl vera áramálssettur, men eigur at sita, soleiðis at skeið hansara umskarar í minsta lagi tvey málráð. Stjórin á Málstovuni skal sjálvandi hava málfrøðiútbúgving í føroyskum, men nýtist ikki at hava granskaraførleikara, heldur skal hann hava hollan fyrisitingarførleika, duga at samskifta við politisku og fyrisitingarligu skipanina omanfyri og hava ans fyri, hvat hendir við føroyska málinum úti í samfelagnum, so hann saman við starvsfólki sínum kann seta ymiskt í verk. Hann skal vilja og duga at ráðleggja vegna stovnin og arbeiða eftir § 2 í lógini um málráð.

# Fororð

Sambært løgtingslóg nr. 59 frá 15. mai 2012 um málráð, broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 13. juli 2017, er í § 10, stk. 3 ásett, at landsstýrismaðurin eftir trimum árum skal leggja frágreiðing fyri Løgtingið um, hvørt lógin virkar eftir ætlan, og kanna um til ber at áseta reglur um Málráð, Staðarnavnanevnd og Navnanevnd í somu lóg.

Ein eftirmeting er gjørd, sum ikki bleiv almannakunngjørd, og verandi Málráð, sum er hitt triðja við setu frá 1. juli 2021 til 30. juni 2025, hevur fingið til uppgávu frá landsstýriskvinnuni í almanna- og mentamálum at avgreiða henda setning í lógini um málráð.

Landsstýriskvinnan heitti á forkvinnuna og næstforkvinnuna og bað Málráðið við fyriliti fyri javnstøðu um at velja triðja limin í bólkinum. Bólkurin bleiv mannaður við Hera Joensen, málráðslimi (vegna Navnanevndina), Helenu Kannuberg, næstforkvinnu, og Randi Kúrberg, forkvinnu. Theodor E. D. Olsen (vegna javnstøðunevndina) var tiltakslimur. Bólkurin átti skrivaraleiklutin, og játtaði forkvinnan at taka skrivarauppgávuna á seg, tí hon hevði frægast umstøður til tað. Meginsetningurin var at fáa svarað spurninginum, um lógin um málráð virkar eftir ætlan, og kannað, um til ber at áseta reglur um Málráð, Staðarnavnanevnd og Navnanevnd í somu lóg.

Síðsta punkt, pkt. 8, í arbeiðssetninginum áttu øll at lisið væl og virðiliga og hugsað um. Tað eigur at veita lesaranum betri hóming av viðurskiftunum, sum Málráð og Málstova virka undir, soleiðis at hann betur gerst førur fyri at gera sær tankar um loysnir, metingar og niðurstøður. Ein partur av svarinum upp á fyrsta spurning *„hvussu Málráðið virkar sbrt. endamálinum í § 2“* finst júst í punkti 8.0.

Bólkurin fór í gongd seint á várið 2023, men ógreitt var, hvussu umfatandi arbeiðið skuldi vera, tí fíggjarkarmur var eingin, og spurningarnir eins og orðið „eftirmeting“ løgdu upp til umfatandi arbeiði. Øll í bólkinum eru í øðrum starvi og mugu tískil avgreiða setningin í frítíðini ella uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

Forkvinnan sat knappa viku í summarferiuni (30 tímar) og fyrireikaði eftirmeting, m.a. spurningar, sum skuldu leggjast fyri Málráðið til góðkenningar/tillagingar. Tað bleiv gjørt á fundi 24. august 2023. Nógv kom fram á tí fundinum, sum var gott tilfar til frágreiðing um, hvussu Málráðið virkar, m.a. áskoðanir um virkisføri og samanberingar við málráðini í øðrum Norðurlondum. Eftir fundin var greiðari, hvussu umfatandi arbeiðið var, og tá ið uppskotið til framferðarhátt bleiv lagt fram á fundi 1. septembur 2023 við landstýrisskvinnuna í almanna- og mentamálum og umboðum frá mentamálaráðnum, varð meira ella minni ført fram, at vit skutu spurv við kanón. Lógin segði í grundini einki um eftirmeting, men nevndi frágreiðing. Spurvarnir vóru lamskotnir tað mesta av heystinum og bóðu so um loyvi at skriva eina frágreiðing og heimild til at víkja frá samtyktu og skipaðu ætlanini við spurnabløðum, samrøðum og kanningum. Hetta bleiv játtað seint á heystið 2023, og millum jóla og nýggjárs setti skrivarin seg við innsavnaða tilfarinum frá sumrinum og øðrum tilfari, m.a. spurningum og uppritum, ið eru fingin til vega við samrøðum við ymiskar viðkomandi persónar. Teir verða ónevndir, men talan er um verandi og fyrrverandi starvsfólk á Málstovuni og fólk, ið hava ella hava havt við Málráð og frágreiðingina *Málmørk* (2007) at gera. Eftir ætlan skuldu uppfylgjandi samrøður og spurningar gerast í januar 2024, men tíð og arbeiðsorka hjá skrivaranum eru farin til at samskipa rættlesturin av Stavsetingarorðabókini. Frágreiðingin varð løgd fyri Málráðið til viðmerkingar og góðkenningar á málráðsfundi 1. februar 2024. Síðan blivu endaligar viðmerkingar og broytingar førdar inn, og hon varð handað landsstýriskvinnuni í almanna- og mentamálum á vári 2024.

Handan Á 5, 15. mars 2024

Randi Kúrberg, forkvinna í Málráðnum og skrivari í frágreiðingarbólkinum
Helena Kannuberg, varaforkvinna í Málráðnum
Heri J. Joensen, limur í Málráðnum

# Arbeiðssetningur

Við støði í løgtingslóg um málráð verður arbeiðsbólkurin biðin um at gera:

**1. eina lýsing av, hvussu Málráðið virkar sbrt. endamálinum í § 2:**
— at røkja, menna og verja føroyska málið og føroyska teknmálið,
— at vegleiða, ráðgeva og gera niðurstøður í málspurningum,
— at áseta føroyska stavseting.

**2. eina lýsing av, hvussu arbeitt verður við uppgávunum sbrt. §§ 5-7, undir hesum at:**
— gera niðurstøður í málspurningum,
— geva landsstovnum og almenningi vegleiðing, ráð og upplýsing um føroyskt mál í skrift og talu,
— svara málspurningum frá stovnum og einstaklingum,
— at savna og skráseta orð,
— gera stavsetingarorðabók.

**3. eina lýsing av samstarvinum við aðrar viðkomandi partar, undir hesum at greiða frá:**
— um samstarvið við Fróðskaparsetrið tryggjar, at vitan og førleikar á málsliga økinum verða gagnnýtt til fulnar.

**4. eina lýsing av, hvussu samstarvið við Staðarnavnanevndina og Navnanevndina virkar, undir hesum:**
— gera tilmæli um, hvørt reglur um Málráð, Staðarnavnanevnd og Navnanevnd eiga at verða ásettar í lógina um málráð.

**5. eina lýsing av, hvussu skipanin við Málráði, t.e. umboðsráði og starvsnevnd, virkar, undir hesum at greiða frá:**
— um ætlanin við einum breiðum málráði umboðandi ymisk sjónarhorn virkar,
— um viðkomandi stovnar hava umboðan,
— um talið á limum er nøktandi.

**6. eina lýsing av, hvussu skrivstovu- og fundarhald virkar, undir hesum:**
— at greiða frá, hvussu Málstovan er skipað og mannað.

**7. eina niðurstøðu um, hvørt lóg um málráð virkar eftir ætlan**

**8. vart við onnur viðurskifti av týdningi**

Miðað verður ímóti, at frágreiðingin telur uml. 20 síður. Frágreiðingin eigur at taka við sjónarmið hjá fyrrverandi forfólkum og viðkomandi samstarvspørtum. Ein frágreiðing var skrivað í 2016, sum tó ongantíð er løgd fram. Arbeiðsbólkurin kann taka við upplýsingar úr henni, har tað verður mett viðkomandi.



## 1.0 HVUSSU VIRKAR MÁLRÁÐIÐ SBRT. ENDAMÁLINUM Í § 2?

**1) at røkja, menna og verja føroyska málið og føroyska teknmálið**
Tað er ilt at skjalfesta støðuna hjá føroyskum, men tað er tað, sum vit mugu og eiga at gera. Annars byggja vit alt á varhuga heldur enn vitan. At røkja, menna og verja … er ófatiliga stór uppgáva, sum bara tykist vaksa við globalisering og talgildum frambrotum. Vit klára illa at fylgja við og mugu leggja meira orku í máltøkni og talgildar arbeiðs- og samskiftisloysnir. Hetta krevur vitan, forvitni, upplæring, annað arbeiðslag, øðrvísi hugsanarhátt og ikki minst fíggjar- og arbeiðsorku.

*Føroyskt er hótt og kann vera útdeytt um 80-100 ár – ella kanska longu um 30 ár* (tað vil siga, at omma og abbi ikki fáa snakkað við barnabørnini á sama máli, men mugu hjálpast við einum lingua franca ella onkrum hybridmáli). Soleiðis sigur professari á Føroyamálsdeildini um støðuna, um hon stendur við. Tá ið ein triðingur av fólkinum í einum landi ikki hevur høvuðsmálið sum í minst lagi sítt annaðmál, er høvuðsmálið hótt[1]. Í Føroyum nærkast talið 10 prosent[2] [3] , og einki bendir á, at talið steðgar ella minkar. Málið missa vit bara eina ferð. Hetta eiga øll at gera sær greitt alt fyri eitt. Og sum samfelag mugu vit taka fylgjurnar av tí – vit sleppa ikki undan, tí málið eins og verðin gongur sína gongd. Vit eiga at hava málpolitikk, sum eisini fevnir um føroyskt fyri tilflytarar, og eiga at gera nógv meira fyri at vinna føroyskum sum øðrummáli rætt í skúla- og arbeiðshøpi.

Føroyskt teknmál er í somu støðu sum føroyskt (skrivað og talað mál) og eigur uppiborið nógv betri sømdir. Á øllum mótum. Við oyramerktu játtanini royna vit at uppfylla pkt. 1 í § 2 í lógini um málráð, men pkt. 2 og 3 gera vit einki við. Lutvíst orsakað av vantandi fakførleika og lutvíst orsakað av vantandi fíggjar- og umsitingarorku. Raðfylgjan er ikki tilvildarlig. At játta pening til SignWiki (teknmálsorðabók) er tað, sum liggur kjarnavirkseminum hjá Málráðnum og Málstovuni næst. Og vit halda, at játtanin ger mest mun, um hon øll verður nýtt til tað, sum svarar til pkt. 1 fyri føroyska málið. Vit kundu tó hugsað okkum, at teknmál fekk sítt egna teknmálsráð ella í minsta lagi teknmálsráðgeva og –samskipara, sum kundu virkað fyri betri samskiftisligum og fólkaræðisligum korum fyri deyv, hoyribrekað og avvarðandi teirra. Eisini átti at verið granskað í føroyskum teknmáli.

Onkrar røddir í Málráðnum halda eisini, at teknmál átti at verið fyri seg og fingið virðing sum eitt sjálvstøðugt mál, tí Málráðið hevur hvørki førleika, arbeiðsorku ella fígging at arbeiða fyri teknmáli, soleiðis at teknmál og teknmálsbrúkarar fáa tær sømdir, sum áttu at verið sjálvsagdar.

**Tilmæli:** Set orku av, arbeiðsorku *og* fíggjarorku, so vit við føroyskum máli kunnu ganga globalisering og talgildum frambrotum á møti. Vit mugu hava málpolitikk og ætlanir fyri føroyskt sum móðurmál umframt sum annaðmál í skúla- og arbeiðshøpi. Føroyskt teknmál eigur somuleiðis at fáa munandi meira fíggjar- og arbeiðsorku, so granskað kann verða í føroyskum teknmáli, umframt at deyv, hoyribrekað og avvarðandi teirra kunnu fáa egið teknmálsráð ella í minsta lagi teknmálsráðgeva og -samskipara.

*[1] Thomason og Kaufmann, 1991: 122 og Knooihuizen, 2010:96-97. T.v.s. at um ein triðingur av samlaða fólkatalinum ikki tosar ella skilur føroyskt, men velur at tosa enskt, so verða tey føroysktalandi meira ella minni noydd at skifta til enskt, vilja tey samskifta við tey ensktalandi.*

*[2] Hagstova.fo Føðiland | Hagstova Føroya*

*[3] Børn fødd í Føroyum, eisini tey hjá útlendskum ríkisborgarum, fáa føroyskan ríkisborgararætt, so talið á teimum, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta (og møguliga annaðmál eisini) er helst hægri.*

**2) at vegleiða, ráðgeva og gera niðurstøður í málspurningum**
Málstovan svarar fyrispurningum frá myndugleikum og almenningi við telduposti ella telefon. Stovnurin nøktar tíverri ikki tørvin og hevur drúgva svartíð. Viðhvørt verða myndugleikar raðfestir fram um almenning, og teldupostsamskifti fram um telefon, men við Skjalhaldi og neyvari skráseting vænta vit at kunna raðfesta betur. Støðan í dag er, at stovnurin veit ikki, hvussu nógvar fyrispurningar hann fær ella svarar. Tá ið stovnurin hevur skift starvsfólk, er tað farið fram uttan mannagongdir fyri, hvussu tingakrossurin verður latin tí næsta, og niðurfeldar mannagongdar hava kanska verið til skjals, men eru ikki til at finna, soleiðis at framhaldandi arbeiðsgongd ikki hevur verið tryggjað á nøktandi hátt. Vit ímynda okkum eisini effektivari samskifti og styttri svartíð, um vit kunnu endurnýta svør til afturvendandi fyrispurningar.

At leggja (nýggj) orð í ymsum bendingarbrigdum og setningar út á heimasíðuna er eisini ein háttur at røkka breitt, tá ið tað snýr seg um almenningin og at vegleiða og ráðgeva. Eitt aftrat, ið vónandi bøtir um tænastu okkara til almenning og myndugleikar, er, at vit hava broytt setanarbroti hjá tí hálvtíðarsetta við tí, sum vit hava ráð til á lønarjáttanini. Í verandi løtu sær út til, at vit klára at fíggja 0,6 ella gott tað, men tað kann vera, at tá ið fyrsti ársfjórðingur 2024 er farin, at vit síggja, at vit klára 0,75. Orsøkin til, at vit ikki hava tveir málfrøðingar í fullum starvi, er, at vit hava raðfest starvsfólk til fyrisiting, so vit klára at halda okkara fyrisitingarligu skyldur sum almennur stovnur (sí „8.0 Onnur viðurskifti av týdningi"). Hóast fyrisitingarfólkið bara hevur verið í starvi hálvt ár hálva tíð, so er tað millum tað rættasta, verandi Málráð hevur gjørt. Nógv skrásetingar- og avhendingararbeiði liggur á láni, og vit hava arbeiði í huga, sum kundi og átti at verið gjørt, so ynskiligt hevði verið at kunna sett starvsbrotið hjá fyrisitingarfólkinum upp á 0,75.

Niðurstøður í málspurningum eru gjørdar, serliga í sambandi við Stavsetingarorðabókina, men eru tíverri ikki so lætt atkomuligar hjá almenninginum. M.a. orsakað av ótíðarhóskandi heimasíðu og skjalhaldi. Hetta er í broyting og batnar, eins og fólk og myndugleikar, ið venda sær til okkara altíð fáa váttan um móttøku. Tíverri er arbeiðsorka at svara øllum langt frá nøktandi, og viðhvørt koma gamlir spurningar undan kavi (bara í viku 3 í 2024 vendu tveir persónar sær til forkvinnuna við spurningum, sum vórðu settir fyri 2-3 árum síðan). Spurningar, sum eru dotnir niðurímillum, tá ið vit ikki høvdu Skjalhald og fyrisitingarfólk at sita við hesum burturav. Hetta er álvarsligt. Lætt at lesa og leypa um, men fyrisitingarliga er hetta ikki í lagi, og so er tað bara ófólkaligt og lítið álitisvekjandi ikki at svara fólki aftur. Í longdini gongur slíkt út yvir trúvirðið hjá stovninum, og hann missir í ringasta føri sína funktión sum myndugleiki.

**Tilmæli:** Játta meiri fígging, so vit kunnu styrkja okkara ráðgevandi og vegleiðandi funktión og leggja um til arbeiðslag, ið tíðin krevur av okkum. Eina sterka umsiting, so vit fáa hildið lógina um innlit og sýnt góðan tænastusið. So stovnurin virkar sum sjálvstøðug skipan, ið tolir, at starvsfólk koma og fara. Vit virka so smátt eftir hesum,



men tað er meira orsakað av treiskni og vilja; tann motivatiónin heldur ikki í allar ævir. Vandin fyri, at fólk verða slitin niður, er avgjørt til staðar.

**3) at áseta føroyska stavseting**
Hetta arbeiði er fyrst og fremst gjørt í sambandi við Stavsetingarorðabókina, t.v.s. tað arbeiði, sum ritstjóri og fylgibólkur hava gjørt. Prinsipiellir spurningar hava verið lagdir fyri Málráðið, eru viðgjørdir, og sumt hevur enntá verið til atkvøðugreiðslu. Hvussu skilagott tað er, kann ivaleyst diskuterast, og fólk verða aldrin á einum máli um, hvør framferðarháttur er skilabestur, tá ið vandi er fyri at standa eftir við svartaperi. Sum er, er Málráðið mannað soleiðis, at ymiskir myndugleikar, stovnar og ymisk yrkisøki eru umboðað. Umboðini hava ofta góðan málførleika og stóran áhuga fyri føroyskum máli, og tað er gott, men viðhvørt ikki nóg gott. T.d. ikki tá ið prinsipiellar avgerðir skulu takast um stavseting. Tá er neyðugt og best, at avgerðir og niðurstøður verða gjørdar við útgangsstøði í ávísum málfrøði- og/ella málvísindaførleika. Tað er aldrin lætt at síggja fylgjurnar av slíkum avgerðum og niðurstøðum langt fram í tíðina, men myndugleikar og almenningur mugu hava álit á, at tey við vitan, lærdómi og royndum, eru best skikkað til hetta. Tað er væl ein orsøk til, at Fólkaheilsustýrið og Etiska ráðið eru mannað við yrkiskønum fólki. Júst tað sama átti at verið galdandi fyri Málráðið. Málfrøðingar og málvísindafólk, sum hava lisið føroyskt, og onnur fólk við hollum málkunnleika til føroyskt og norrønt hava ymsar meiningar, men tey bæði duga og klára at føra tær fram. Eingin ótti eigur at vera fyri, at hesi málfólk ikki eisini eru før fyri at hugsa um fólkaræði og vera samfelagsumboðandi, tá ið tey gera úrskurð í málspurningum. Myndugleikin, sum mannar Málráðið eigur at vísa teimum tað álit og krevja av teimum, at tey eisini hava fólkaræði og samfelagsumboðan við í avgerðum sínum.

Ein loysn ella annar máti at tryggja fólkaræði og samfelagsumboðan er at manna Málráðið sum í onkrum grannalondum okkara, t.v.s. eitt stórt málráð, sum ongan formligan avgerðarrætt hevur, men sum sleppur at føra sjónarmið fram og verður hoyrt í ymiskum málum. Síðan kundi ein starvsnevnd verið, ið var mannað við málfrøðingum og málvísindafólki. Fremsta ella kanska einasta uppgáva hennara skuldi verið at taka støðu til málspurningar. Alt ov títt útskifting er óheppin, lutvíst tí fólkagrundargrundarlagið (fólk við hægstu føroysku málútbúgving) er ikki so stórt, og lutvíst tí neyðuga støðufestið og reglusemið, sum slíkir málspurningar hava uppiborið at fáa, ikki fáast undir slíkum treytum. Fyrisiting, fíggjarmál og starvsfólkaviðurskifti skulu vera fyri seg undir stjóraábyrgd. Lóg um persónsdátuupplýsingar (GDPR) styrkja hesa grundgevingina, og starvsskipanin, sum vit nú fylgja, er afturúrsigld og lýkur ikki krøv um persónsdátutrygd. Dømi um hetta er í sambandi við starvssetan, tá ið setanarbólkur skal gera tilmæli til starvsnevndina, sum setur fólkið. Tað er óneyðugt at fara út um setanarbólkin við slíkum upplýsingum.

Av tí at stovnurin hevur havt eitt misjavnt skjalhald, skift/mist starvsfólk og ikki havt nóg greiðar mannagongdir um at bera vitan og førleikar víðari

(handa næsta fólki tingakrossin trygt og væl), eru verandi Málráð, starvsnevnd og starvsfólk á Málstovuni ikki fullvís í, at allar prinsipiellar avgerðir eru skrásettar ella til at finna, og at málarbeiðið verður útint í samsvari við tær. Hetta er álvarsligt og má broytast alt fyri eitt. Fyrsta læringin er, at vit mugu hava greiðar fyrisitingarligar mannagongdir og seta neyðuga fígging og arbeiðsorku av, so hetta ikki hendir í framtíðini. Síðan er tað tann parturin, sum er farin (tað, sum er hent farnu 10 árini), sum má takast upp til viðgerðar og eftirmetingar fyri seg. T.d. kundu allar ella fleiri prinsipiellar avgerðir verið eftirkannaðar viðvíkjandi mannagongd, tá ið tær vórðu lagdar fram, viðgjørdar og samtyktar. Eisini kundi verið hugt at, hvussu avgerðirnar roynast og hava roynst. Sambært tí kundi niðurstøða verið gjørd um, hvussu mannagongdin skal vera í framtíðini. Hetta arbeiðið kundi verið fevnt av framtíðar løggilding, sum starvsnevndin, um hon verður mannað við málfrøðingum og málvísindafólki, sum mælt til omanfyri, tók sær av. Eitt løggildingarráð ella ein løggildingarnevnd kundi eisini verið ein møguleiki.

**Tilmæli:** Játta meiri fígging, sí tilmæli undir pkt. 2 s. 12. Umhugsa eitt málráð við øðrum bygnaði og aðrari funktión. Fleiri møguleikar eru. Vita, hvat grannalondini gera, og hvat riggar har. Set ein bólk at kanna hetta og gera tilmæli, sum verður fylgt.

## 2.0 HVUSSU VERÐUR ARBEITT VIÐ UPPGÁVUNUM SBRT. §§ 5-7?

**1) gera niðurstøður í málspurningum**

**2) geva landsstovnum og almenningi vegleiðing, ráð og upplýsing um føroyskt mál í skrift og talu**

**3) svara málspurningum frá stovnum og einstaklingum**
1-3 eru svarað omanfyri – í punkti 2

**4) at savna og skráseta orð**
§ 5, stk. 4 og 5 er lítið og einki gjørt við orsakað av vantandi fíggjarorku. Vantandi fíggjarorka ger, at vit ikki hava ráð til arbeiðsmegi – hvørki málkøn ella teknmálskøn fólk. Sama er galdandi fyri § 6 (sí nevndu stykki og greinar í lógini um málráð niðanfyri).

*Stk. 4.1) Málráðið skal í samvinnu við yrkisbólkar menna gott føroyskt yrkismál og teknmál.*

*Stk. 5. Málráðið skipar fyri átøkum, málinum at frama.*

*§ 6.1) Málráðið savnar og skrásetir nýkomin orð, máliskur, framburðir og onnur málslig fyribrigdi í føroyskum og er til hjálpar at velja og evna til nýggj orð. Sama er eisini galdandi fyri føroyskt teknmál.*

Nú stavsetingarorðabókin kemur út móðurmálsdagin 25. mars 2024, verður arbeiðsmegi loyst til aðrar uppgávur, og verða partarnir av §§ 5-7, sum hava ligið og bíðað, raðfestir frammarlaga. Ein máti at greiða stk. 4 í § 5 er at arbeiða styðjandi og styrkjandi (fasiliterandi) saman við uttanhýsis pørtum. Greiðmál (klarspråk) má stovnurin avgjørt gera nakað við. Miðað verður móti hesum, men greitt er, at hesin setningur hevði verið lættari lokin, um stovnurin hevði stjóra, ið burturav kundi arbeiða við slíkum viðurskiftum.

**Tilmæli:** Avgjørt neyðugt við stjórasetan og dagligari leiðslu á staðnum og hægri ársnormi (í *Málmørkum* (2007) var víst á, at stovnurin í øllum førum skuldi hava fimm ársverk, og tá var fyrisiting ikki roknað uppí.)

**5) gera stavsetingarorðabók**
Tað stóra takið er tikið, og eftir 25. mars 2024 snýr tað seg um at dagføra og halda viðlíka orðabók, heimasíðu og talgilda undirstøðukervið, so arbeiðið ikki verður til fánýtis, men heldur sítt dagsvirði.

Stavsetingarorðabókin kemur bara út í talgildum líki, og hon kemur út á heimasíðuni hjá Málráðnum, sum er lagað til endamálið. Málið um løggilding hevur verið til viðgerðar hjá aðalráði okkara, og niðurstøða um at samtykkja mannagongdina í uppskoti er gjørd miðjan februar 2024. Arbeiðið við at rættlesa stavsetingarorðabókina er í gongd og gongst sum ætlað.

Vit kundu hugsað okkum at eftirmett arbeiðið við stavsetingarorðabókini og sett mál fyri, eitt nú hvussu mong nýggj orð skulu leggjast inn hvørt fjórðingsár, nær dagføringar skulu almannakunngerast, um tað ber til at lúka teir partarnar av lógini um málráð, sum vit ikki fáa hildið nú, samstundis sum vit nøra um stavsetingarorðabókina. Somuleiðis skulu vit taka støðu til, hvussu prinsipiellar avgerðir verða tiknar og koma til sjóndar í stavsetingarorðabókini, og hvussu kunning skal út til myndugleikarnar, tá ið slíkar avgerðir eru tiknar o.t. Sí annars tað, sum er nevnt undir pkt. 3 á s. 13-14.



## 3.0 SAMSTARV VIÐ AÐRAR VIÐKOMANDI PARTAR

**a)** *Vit hava gott samstarv við Føroyamálsdeildina* og eru fegin um lagaligu húsaleiguna og atgeingið til orðabókaforritið RiSt og onnur søvn og annað tilfar. Starvsfólkini skifta og søkja sær vitan stovnanna millum, men á meira ella minni óformligum stigi. Tað hevði verið munandi betri, um samstarvið varð gjørt formligt og skipað við arbeiðsbólkum og/ella toymum, ið fingust við ávís evni ella arbeiðsuppgávur í ávíst tíðarskeið ella við ávísum endamáli fyri eyga. Tá høvdu vit helst eisini verið betur før fyri at sagt, um samstarvið tryggjaði, at vitan og førleikar á málsliga økinum vórðu gagnnýtt til fulnar. At virka fyri hesum tekur tíð og er serligt ábyrgdarøki, sum eftir okkara tykki vísir á, at stjóri á Málstovuni er neyðugur.

Vit hava somuleiðis gott samstarv við Námsvísindadeildina, men eisini tað átti at verið gjørt formligt, so ein sum frægast tryggjar seg móti vitanar- og samstarvsmissi o.t., tá ið starvsfólk fara ella onnur viðurskifti broytast.

Skal lóg um málráð broytast, kundi orðið „Fróðskaparsetrið“ verið skift út við „Føroyamálsdeildina og Námsvísindadeildina“ ella tað stóð „… samstarvar við Fróðskaparsetrið, serliga Føroyamálsdeildina og Námsvísindadeildina …“. Tað hevði verið greiðari, men fram um alt ein uppgáva hjá so lítlum stovni sum Málráðnum/Málstovuni, sum hevði borið til.

Vert er eisini at umhugsa, um vit heldur skuldu arbeitt eftir kunngerð í staðin fyri lóg.

**Tilmæli:** Set stjóra, sum stendur á odda fyri ráðlegging og málseting vegna Málstovuna og Málráðið og í samstarvi

við eitt nú Føroyamálsdeildina, Námsvísindadeildina, Fróðskaparsetrið í síni heild og onnur viðkomandi. Vit mugu koma burt frá leiðsluloysi og tilvildarligum óformligum starvi sum ráðandi samstarvi. Óformligt samstarv er kreativt, innovativt og bæði vælkomið og kærkomið, men skal undir ongum umstøðum standa einsamalt.

**b)** Samstarvið við Staðarnavnanevnd og Navnanevnd er formaliserað á tann hátt, at tær hava hvør sítt umboð í Málráðnum, og Málráðið hevur eitt umboð í Staðarnavnanevndini. Í aðrar mátar er ikki talan um stórvegis skipað samstarv, men partarnir spyrja hvønn annan, tá ið tørvur verður hildin at vera á tí. Eingin av pørtunum hevur fólk í starvi, og eingin hevur aðra leiðsluábyrgd enn at vera forfólk, ið meira ella minni bara tekur sær av fundarvirksemi (einasta samsýning, nevnd fundarsamsýning, staðfestir hetta og leggur ikki upp til annað).

Staðarnavnanevndin er tó partur av Málráðnum, tá ið tað snýr seg um játtan, tí 30.000 DKK av samlaðu játtanini eru oyramerktar til Staðarnavnanevndina.

Hvussu Navnanevnd og Staðarnavnanevnd føra skjalhald og klára at halda fyrisitingarlóg, veita alment innlit o.t. sum liggur á almennum stovnum, vita vit ikki, men avvarðandi myndugleikar áttu kanska at spurt um hetta.

Vit í arbeiðsbólkinum, sum skrivar hesa frágreiðingina, og Málráðið vísa á, at vit ikki eru tey røttu at siga og meta um, hvørt tað ber til at gera reglur um Málráð, Staðarnavnanevnd og Navnanevnd í lógina um málráð, sí meira undir pkt. 4.0.

**Tilmæli:** Set skikkað fólk at siga og meta um, hvørt tað ber til at gera reglur um Málráð, Staðarnavnavend og Navnanevnd. Spyr um fyrisiting og løggilding (Staðarnavnanevndin) fyri at fáa nóg gott metingargrundarlag um fígging, fyrisitingarførleika, hølisumstøður o.t.

**c)** Samstarvið við norðurlendskar stovnar er avmarkað, men tað, sum er, er gott og viðkomandi. Vit hava eygleiðaratign í norðurlendska netverkssamstarvinum. Vit plaga at vera umboðað við málsliga samskiparanum og forfólki/umsjónarfólki. Tað riggar, men er dýrt fyri forfólkið, sum má fíggja ferðina við feriu ella mistari arbeiðsinntøku[4]. Tað er ógvuliga upplýsandi, áhugavert og gevandi at vera við í slíkum samstørvum. Neyvan fæst so nógv at vita um so mangt upp á so stutta tíð í øðrum samanhangi, og mæla vit til at halda á við slíkum samstørvum. Næsti netverksfundur verður í Íslandi 28.-30. august 2024.

Málráðið er eisini umboðað í NFL (Nordisk forening for leksikografi) og er við á árligum fundi. Tað er ritstjórin á Stavsetingarorðabókini, ið umboðar stovnin. Hetta er gevandi og meiningsfult netverk at vera partur av, og er ætlanin at halda fram við tí.

Málráðið vil fegið vera partur av øðrum og fleiri norðurlendskum netverkum, men samsvar má vera millum fígging, arbeiðsorku og hesa raðfesting. Játtanarmyndugleikin kann spyrja seg sjálvan, hvat hann vil vegna stovnin, og sjálvandi játta fígging í samsvari við viljan. Málráðið torir hinvegin at lova játtanarmyndugleikanum, at tann viljin skal síggjast aftur í arbeiði, samstarvi, netverkum o.t.

**Tilmæli:** Set stjóra, sum saman við málfrøðingunum á Málstovuni, umboðar stovnin í viðkomandi netverkum og samstørvum. Forfólk ella aðrir málráðslimir, sum mugu fíggja slíka umboðan við lønar- ella frítíðarmissi, eiga at fáa fult viðurlag. Alt annað er burturvið.

*[4] Verandi forkvinna fer ikki av stað aftur undir galdandi treytum, men vil heldur virka fyri, at onkur annar fer undir bøttum treytum*



## 4.0 SAMSTARV VIÐ STAÐARNAVNANEVNDINA OG NAVNANEVNDINA

### 1) Samstarvið er lýst í broti b undir 3.0

### 2) Tilmæli um, hvørt reglur um Málráð, Staðarnavnanevnd og Navnanevnd eiga at verða ásettar í lógina um málráð

Sum áður víst á, meta vit okkum ikki skikkað at gera eitt tilmæli, men vit kunnu vísa á viðurskifti, ið upplýsa og møguliga lætta um hjá tí, sum í aðrar mátar kann meta um og gera tilmæli, sí leinki til skjal, sum Eivind Weyhe (EW) hevur skrivað undir vegna Staðarnavnanevndina í 2010, 170.11 Skjal 18.pdf (logting.fo).

Eins og víst verður á skjalinum, sum EW hevur skrivað undir, virka Málráðið og Navnanevndin eftir lóg, og Staðarnavnanevndin eftir reglugerð. Staðarnavnanevndin er fyrst og fremst ætlað at ráðgeva myndugleikum og hoyra teir viðvíkjandi nøvnum á almennum støðum og føroyakortum. Eisini ásetur Staðarnavnanevndin form og stavseting á staðarnøvnum í almennari nýtslu. Mentamálaráðið hevur givið staðarnavnanevndini heimild at løggilda staðarnøvn (sí meira á leinkinum Málráðið (malrad.fo)[5]. Tann mannagongdin er soleiðis, at um myndugleikin, ið spyr um staðarnavnið ella varðar av tí, fylgir tilmælinum frá Staðarnavnanevndini um stavseting, ella stavsetingin hjá myndugleikanum svarar til tað, sum Staðarnavnanevndin hevði mælt til, so er staðarnavnið løggilt. Um so er, at myndugleiki ikki fylgir tilmælinum, kann staðarnavnið verða nýtt uttan løggilding. Helst ein skilagóð og diplomatiskt loysn, men Stavsetingarorðabókin má verða løggildað eftir øðrum leisti. Uppskot um mannagongd er løgd fyri Mentamálaráðið 31.10.23 og spurt um 28.12.23 og fylgt upp við enn einum spurningi 31.01.24. Mentamálaráðið heldur tað vera vert at umhugsa at fáa FMD at gera stakroyndir av komandi Stavsetingarorðabók. FMD vísir á, at tað er heldur seint at koma inn í tilgongdina nú, serliga tá ið lóg um málráð ikki nevnir FMD. Ein annar partur av málinum um løggilding er løggilding í framtíðini. Helst verður tað eitt tvíbýti millum árligar ella regluligar dagføringar, ið fylgja galdandi viðtøkum um stavseting og bending, t.v.s. leggja nýggj orð inn og taka onnur úr, men prinsipiellar avgerðir krevja løggilding, sum ikki verður gjørd so tíðum, t.d. tíggjunda hvørt ár. Í hesum sambandi kundi verið gott at manna eitt løggildingarráð ella eina løggildingarnevnd við málfrøðingum og málvísindafólki við útbúgving í føroyskum, sum hevði umboðan av FMD, NÁD, Málstovuni, starvsnevnd og møguliga onkrum øðrum stovni.

Málráð og Navnanevnd arbeiða fyri bæði almenning og myndugleikar, tað ger Staðarnavnanevndin, sum arbeiðir eftir reglugerð, ikki. Ella – tað nýtist henni ikki at gera. Málráð og Staðarnavnanevnd hoyra til Almanna-

*[5] Hon treingir til dagføring, tí í § 2 stendur, at ein limur verður valdur eftir tilmæli frá Føroysku málnevndini. Henda fór í søguna, tá ið Málráð varð skipað fyri góðum 10 árum síðan.*

og mentamálaráðið, og Navnanevndin er undir Løgmálaráðnum.

Helst er skilagott at fáa allar partar undir sama aðalráð og sama landsstýrisfólk. Harnæst hava vit hoyrt onkran siga, at rammulóg kundi verið ein loysn, og so kundu nevndir og ráð arbeitt eftir kunngerð í staðin. Kanska hevði tað verið ruddiligari, men hatta mugu, sum áður nevnt, lógarkøn fólk meta um.

Sum ført varð fram í nevnda skjali omanfyri, hevði tað helst verið skilagott við felags umsiting, men tað arbeiðið skal vera væl fyrireikað, eins og ein skal gera sær greitt, hvat ein ger við skjalhald, persónsviðkvæmar upplýsingar, og hvussu ein goymir tilfar, ið møguliga er áhugavert í granskingarhøpi.

Haraftrat skal ein eisini hava starvsfólkagegni í huga. Føroyska verðin við málfrøðingum er lítil, og vit mugu hava eina meining um, hvussu best verður farið fram. Skal bera til hjá starvsfólkum á Málstovuni at vera limir í nevndum, sum gera tilmæli og taka avgerðir, ið fólk møguliga kæra um, og sum tey sum starvsfólk á Málstovuni, men eisini nevndarlimir, skulu viðgera?

Ein afturvendandi søga í hesum viðfangi er kærumøguleikin, sum borgarin hevur havt í navnamálum: Borgari fær sýtt navnaumbøn, kærir avgerðina hjá navnanevndini fyri avvarðandi myndugleika, sum sendir navnanevndini kæruna, so navnanevndin kann viðgera kæru um egna avgerð.

Slíkum má ein royna at fyribyrgja, um so er, at avgerð verður tikin um felags umsiting. Felags umsiting kann helst vera gagnlig og munagóð á mangan hátt, men veruleikin fyri tey trý, Navnanevnd, Staðarnavnanevnd og Málráð, man vera, at øll hava lítla ella onga umsiting, nógv óformligt samstarv og alt ov lítið formligt skipað samstarv, greiðar mannagongdir og sum heild málsviðgerð, ið hóskar til dagsins samfelag.

Hevði felagsumsiting verið veruleiki, kundi talan verið um eitt stak áhugavert fakligt umhvørvi, sum bæði kundi styrkt og ment stovnin inneftir og úteftir, eitt nú samstarvið við Føroyamálsdeildina, sum kundi borið brá av bæði sparring og kapping.

**Tilmæli:** Fá skikkað fólk at meta um, um tað ber til at gera rammulóg fyri Málráð, Staðarnavnanevnd og Navnanevnd. Tak undir hesum eisini støðu hvørjum aðalráð/landsstýrisfólki slíkur stovnur eigur at vera undir, hvør kærumyndugleikin skal vera, og hvussu ein frægast kemur burtur úr iva um gegni. Tryggja honum nøktandi fyrisiting, undir hesum skikkað starvsfólk, hóskandi høli og nøktandi fígging. Felags umsiting kundi lagt upp til áhugavert fakligt umhvørvi, men neyðugt er við stjóra og eini væl skipaðari organisatión við greiðum samskiftisleiðum og mannagongdum.

## 5.0 HVUSSU VIRKAR SKIPANIN VIÐ MÁLRÁÐI, T.E. UMBOÐSRÁÐI OG STARVSNEVND?

Tá ið farið var frá Føroysku málnevndini til Málráð við Málstovu var í veruleikanum talan um nýggjan stovn við sekretariati. Tíverri bleiv nýggi stovnurin skipaður sum eitt bland av gomlu nevndini og nýggjum organisatiónsstrukturi. Í grundini „eitt hvørkisella“, sum Carl Johan Jensen kanska hevði málborið seg. Størsti feilurin, nú vit kunnu líta 10 ár aftur, man vera, at stovnurin ongan formligan stjóra fekk, sum hevði ábyrgd av at stýra, ráðleggja (orða og fremja strategi) og halda stovnin dagførdan, t.d. á talgilda mótinum viðv. orðabókagerð, skjalhaldi, persónsdátuupplýsingum, føstum mannagongdum, upplæring og raðfestingum so lógin um málráð verður hildin á besta og skynsamasta hátt o.t.

**Tilmæli:** Stovnurin skal hava sekretariat við stjóra og greitt skipaðan bygnað við greiðum málsetingum, samskiftislinjum og fara í holt við greiðmál sum skjótast.

### 1) um ætlanin við einum breiðum málráði umboðandi ymisk sjónarhorn virkar

Hon riggar helst best í huganum og á pappírinum. Øll, sum umboða úrvali av ávísum felagsskapum nevndum við navni í lógini um málráð, sleppa til orðanna, men bara tvær ferðir um árið, og tey kunnu vera meira ella tvingað í ráðið vegna tann felagsskap, tey umboða. Helst hevur verið hugsað um fólkaræði og samfelagsumboðandi manning í Málráðnum, men eingin orsøk er at halda, at færri limir við hollari málútbúgving og/ella málførleika ikki klára at taka fólkaræði og samfelagsumboðan við í metingar og avgerðir sínar. Færri limir høvdu helst gjørt tað, at óneyðugt var við eini starvsnevnd, og soleiðis høvdu limir í Málráðnum fingið meiri beinleiðis ávirkan á málspurningar og onnur viðurskifti, sum starvsnevndin nú situr við. Teir høvdu hitst oftari, t.d. eina ferð um mánaðin, og kunnað fylgt betur við, sí annars pkt. 3 á s. 7-8.

Á fundi 24. august 2023, tá ið eftirmetingarspurningarnir vórðu viðgjørdir, førdu fleiri fram, at bygnaðurin var óheppin og misvísandi. Ein fekk varhuga av, at ein slapp at hava ávirkan og taka avgerðir, men soleiðis var ikki. Fund tvær ferðir um árið var alt ov lítið. Í miðlunum hevur onkur politikari funnist at og víst á, at fyrrverandi málráðslimir hava ført líknandi fram, t.d. at teir lítla og onga ávirkan høvdu, mintust ikki og vistu ikki, hvat fór fram, tí fundarfrásagnir komu langt aftan á ein málráðsfund ella beint áðrenn næsta fund. Vit hava bøtt um hetta og broytt mannagongdir, men hetta kann gerast betur, tí hóast vit hava samtykt, at fundarfrágreiðingar frá starvsnevndarfundi skulu verða sendar málráðslimunum, so teir fáa fylgt við dagliga arbeiðnum, er hetta ikki vorðið gjørt í nóg stóran mun. Vit hava umrøtt hetta og taka okkum aðrar partar fyri alt fyri eitt.

**Tilmæli:** Sum heild tekur verandi Málráð undir við, at frægari hevði verið við títtari fundum, størri ávirkan og meira innliti. Kanska skulu vit tora at ofra nakrar limir til frama fyri ynskinum um ávirkan og innlit og javnan minna limirnar á at hugsa fólkaræðisligt og samfelagsumboðandi.

### 2) um viðkomandi stovnar hava umboðan

Tað er óheppið, at § 3 í lógini um málráð nevnir feløg, sum ikki eru til longur, at hava umboðan í Málráðnum, t.d. Móðurmálslærarafelagið. Haraftrat kann ein undrast á, at ein stovnur sum KvF ikki er umboðaður. Alt hetta talar kanska einamest fyri, at tørvur er á

kunngerð, har limir kundu verið nevndir og strikaðir, uttan at lógarbroyting krevst.

Um færri limir verða í Málráðnum, kundu limirnir umboðað ávís toymi, t.d. føroyskt sum annaðmál, føroyskt í undirvísingarhøpi, føroyskt teknmál, føroyskt miðlamál, føroyskt kirkju- og trúarmál. Á tann hátt kann ein tryggja fólkaræði, samfelagsumboðan og veikum røddum ljóð. Summir limir kunnu vera fastir, t.d. Føroyamálsdeildin, Staðarnavnanevndin og Navnanevndin (umboðað av málfrøðingi, ið tekur undir við § 2), og so kundu aðrir stovnar skiftst um at manna hinar sessirnar.

Toymini kundu hitst eftir tørvi og ført viðkomandi mál fram fyri Málráðnum og/ella stjóranum á Málstovuni.

**Tilmæli:** Tað er umráðandi, at Málráðið er mannað við málfrøðingum og málkønum og málhugaðum fólki. Hóast stovnurin fær stjóra er neyðugt við virðiligari samsýning til forfólkini, tí samsvar eigur at vera millum útbúgvingarkrøv og samsýning.

**Tilmæli:** Limir eiga at kunna sita longur, tí tað tryggjar Málráðnum stabilitet og varandi vitan.

Sum er, eru somu stovnar altíð umboðaðir, men limir kunnu ikki sita longur enn tvær setur, t.v.s. tvær ferðir fýra ár. Tað er kanska hóskandi, men havast má í huga, at talið á málfrøðingum at taka av ikki er so stórt. Er starvið hugaligt og meiningsfult, er lætt at manna sessirnar – og øvut.

**3) um talið á limum er nøktandi**
Sí punkt 1 og umhugsa at leggja starvsnevnd og málráð saman til málráð mannað við 7 limum, sum fundast eina ferð um mánaðin. Kostnaðurin verður á leið hin sami.

## 6.0 SKRIVSTOVU- OG FUNDARHALD

Aftast undir 8.0 er greitt frá, hvat verður mett týdningarmest og grundleggjandi fyri alt annað.

Málstovan eigur at vera skipað sum sekretariat við stjóra. Vit eru á veg við summum fyriskipanum, so vit sum stovnur halda lóg um alment innlit og sýna góðan fyrisitingarsið. Vit hava sett fyrisitingarfólk og fara at nýta restina av lønarjáttanini til hægri starvsbrot til hin málfrøðingin, sum arbeiðir niðursetta tíð, so:

1) vit fáa avgreitt fleiri málspurningar
2) lagt arbeiðslagið um, so vit fáa hildið aðrar partar av lógini um málráð, sum vit ikki hava klárað at hildið.

Viðvíkjandi málráðsfundum og starvnevndarfundum hevur verið funnist at, at fundarfrásagnir komu limunum ov seint til viðmerkingar, og at málráðslimirnir høvdu ov lítið innlit og lítla ávirkan.

**Broytt arbeiðslag:** Viðvíkjandi fundarfrásøgnum er tað at siga, at tað er skipað betur, soleiðis at fundarskrivarin avgreiðir fundarfrásøgnina dagin eftir fundin, fær limunum hana í seinasta lagi tríggjar yrkadagar eftir fundin. Limirnir góðkenna fundarfrásøgnina við at svara aftur, og viðmerkingar skal skrivarin hava í seinasta lagi tríggjar dagar eftir, at limirnir hava fingið fundarfrásøgnina. Fundarfrásøgnin verður formliga undirskrivað á næsta fundi.

Umframt at hava stórt gagn av fyrisitingarskrivaranum á Málstovuni hava bæði málráðsfundir og starvsnevndarfundir stóran ágóða av tí starvssetanini. Ein váttan um, at Málstovan skal arbeiða sum eitt sekretariat og *vera* eitt sekretariat.



**Tilmæli:** Viðvíkjandi vantandi ávirkan á málráðsarbeiði orsakað av fáum málráðsfundum mugu vit bara siga, at vit skilja atfinningina, men fáa ikki gjørt so nógv við tað annað enn at mæla til at leggja starvsnevnd og málráð saman og enda á t.d. 7 limum, sum møguliga kunnu umboða eitt toymi, ið umboðar málsliga sergrein ella málbólk, t.d. føroyskt undirvísingarmál, miðlamál ella føroyskt sum annaðmál.

Hin loysnin er at seta eitt breitt málráð uttan avgerðarrætt, men við møguleika at verða hoyrt og kunna gera tilmæli, sí pkt. 3 á s. 7-8.

**Tilmæli:** Hægri játtan, so vit fáa lønt stjóra fulla tíð og fyrisitingarfólkinum 0,75 heldur enn 0,5, sum er verandi støða.

## 7.0 NIÐURSTØÐA UM, HVØRT LÓG UM MÁLRÁÐ VIRKAR EFTIR ÆTLAN

Partar av lógini um málráð virka, serliga § 2. T.d. hevur arbeitt verið við stavsetingarorðabók, men løggildingarmannagongdin er ikki samtykt enn (tað átti hon at verið frá fyrsta degi, men helst er vantandi fyrireiking til umlegging frá Føroyskari málnevnd til Málráð og Málstovu orsøk til tað). Teknmálsarbeiðið við SignWiki er gjørt við støði í § 2, men vit høvdu viljað, at føroyskt teknmál fekk munandi betri umstøður, bæði viðvíkjandi fígging og arbeiðsmegi.

Eisini stk. 2 og 3 í § 5 hava virkað heilt hampiligt, men stk. 4 og 5 og § 6 hava ligið og bíðað.

Aðrir partar av lógini um málráð og samstarv við aðrar partar, sum lógin ásetur, virka eisini, men aloftast á óformligum stigi, og tað má broytast og skipast betur. Tað gerst m.a. við styrktari fyrisiting, mannagongdum o.t., sum eingin hevur havt formligu ábyrgdina av higartil. Tað arbeiðið er í gongd og gongur framá, men ein stjórasetan við greiðum starvssetningi kundi tryggjað og skundað undir hetta arbeiðið.

Forfólkið hevur dagligu ábyrgdina sum umsjónarfólk, men eingin veit reiðiliga, hvat tann uppgávan inniber, og tykist hon stava frá Føroysku málnevndini, sum fór í søguna fyri meira enn 10 árum síðan. Forkvinnusamsýningin bendir heldur ikki á nevniverda ábyrgd og arbeiðsbyrði, og undanfarin forfólk kunnu ikki lastast fyri vantandi nakað sum helst, tí tey fingu ikki nakað sum helst – bara fundarpengar.

Lógin um málráð skuldi kanska verið gjørd sum rammulóg við kunngerðum, sum Málráðið, Navnanevndin og Staðarnavnanevndin virka eftir. Sum er virkar Staðarnavnanevndin eftir reglugerð og hini eftir lóg. Vit eru málkøn og ikki lógarkøn, so vit vita ikki stórt meira at siga um, hvørt hetta ber til ella ikki, og hvussu hetta skal verða gjørt.

Onkur góður tanki hevur verið frammi um felags fyrisiting. Tað ber helst til, men læringin av umleggingini frá Føroyskari málnevnd til Føroyskt málráð má vera, at tað má fyrireikast og skipast væl við neyðugari fíggjar- og arbeiðsorku, soleiðis at vit fáa virkað sum almennur stovnur, ið heldur landsins lógir, sýnir góðan fyrisitingarsið og tænir fólkinum sambært lógini um málráð, men eisini við dagførdari máltænastu, ið gongur framtíðini á møti.

## 8.0 ONNUR VIÐURSKIFTI AV TÝDNINGI

Stovninum tørvar dagliga leiðslu, ið stendur á odda fyri fyrisitingini á Málstovuni, soleiðis at máltænasta, orðabókagerð, málsamstarv við uttanhýsis partar og ráðlegging og málseting í samstarvi við starvsnevnd/ Málráð verður útint, tillagað og endurskoðað, so arbeiðsmegi og fíggjarmegi verða gagnnýtt til fulnar.

Ivasamt er, hvussu væl skipað skiftið frá føroyskari málnevnd til málráð var, tí tá ið verandi málráð tók við í juli 2021, var fyrisiting, fíggjarumsiting og skjalhald partvís uttanhýsis og býtt millum starvsfólkini uttan at verða samlað, soleiðis at tey ikki høvdu atgeingi til upplýsingar, mannagongdir og møgulig svar upp á málsligar fyrispurningar hjá hvørjum øðrum. Sumt tilfar lá skrásett í pappírslíki í eskjum, annað á teldu hjá fyrrverandi starvsfólki, og ógreitt var, hvat var avhendað Skjalasavninum, hvat skuldi avhendast, nær og um tað skuldi vera í samgildum ella talgildum líki. Heimasíðan var ótíðarhóskandi, og arbeitt varð við at gera stavsetingarorðabók, sum skuldi koma út bæði í samgildum og talgildum líki[6].

Stovnurin hevði verið raktur av sjúku, verið undirmannaður okkurt tíðarskeið, nýtt starvsfólk fekk onga beinleiðis upplæring sambært mannagongdum á arbeiðsplássinum, og ógvuliga ivasamt var, í hvønn mun stovnurin var førur fyri at veita alment innlit, sýna góðan fyrisitingarsið og halda lógina um alment innlit. Hetta varð tikið í størsta álvara og forkvinnurnar báðar, sum til skiftis hava verið forkvinna og næstforkvinna, hava við undirtøku frá starvsnevnd, Málráði og starvsfólkum á Málstovuni virkað fyri at byggja upp fyrisiting, ið nøktar tey krøv, ið samfelagið setur. Tað varð gjørt við:

**1)** at seta fólk í verkætlanarstarv at kanna, um grundarlag var fyri at seta eitt fólk burturav at fáast við fyrisiting
**2)** at fáa skjalhaldsskipanina Skjalhald og knýta seg upp í Landsnet (hetta tók okkum 16 mánaðir og var hetta óneyðuga arbeiðs- og orkukrevjandi hjá fólki, ið hava málráðsarbeiði sum framíhjástarv)
**3)** at seta fyrisitingarskrivara, tryggja upplæring og hóskandi lønarflokking (eisini óneyðuga arbeiðs- og tíðarkrevjandi hjá fólki, ið hava málráðsarbeiði sum framíhjástarv)

Arbeiðsumhvørvið á stovninum er lítið og viðkvæmt, men kann eisini vera tætt og sterkt. Arbeitt hevur verið við at styrkja hetta við trivnaðartiltøkum og føstum mannagongdum, t.d. vikuligum stuttfundi, mánaðarligum fundi við forkvinnuni og/ella næstforkvinnuni. Starvsfólkini, vitan og førleikar teirra eru kjarnin í virkseminum, og tí er ikki lætt at skifta starvsfólk út í eini handarvending. Ein kann leggja upp fyri veikleikanum við at arbeiða í toymi, skifta øll øki millum starvsfólkini við høvuðsábyrgd og medábyrgd og hava skrivaðar mannagongdir samlaðar á einum stað, so røtt viðkomandi fáa atgeingi til teirra. Slíkt arbeiðslag tryggjar stabilitet og atgeingi til vitan og avgerðir, men kann harumframt eisini vera trivnaðarfremjandi, og er ætlanin í 2024 at leggja um til hetta.

*[6] Tað er at undrast á, tí eingin samtykt er um stavsetingarorðbók í pappírslíki, og í øllum viðmerkingum, tá ið lógin um málráð skuldi setast í gildi, verður bara tilgild orðabók nevnd. Lítil ivi er um, at hevði stovnurin havt stjóra, hevði slíkt ivamál ikki stungið seg upp. Tað hevur eisini ávirkað arbeiðsgongd og tíðarnýtslu viðvíkjandi stavsetingarorðabókini.*

# 2024 verður árið …

- 2024 verður árið, har løggild stavsetingarorðabók eftir gott 10 ára arbeiði verður latin almenninginum.
- 2024 verður somuleiðis árið, har tøk verða tikin fyri at halda teir partarnar av lógini um málráð, sum stovnurin ikki hevur havt orku til higartil, t.d. arbeiði við yrkisorðum, orðalistum, greiðmáli[7].
- Ráðlegging og málseting í royndini at skipa arbeiðið betur, gera tað sjónligt og fáa almenninginum tað til góðar, eru eisini partur av tí, sum forkvinnurnar hava sett sær fyri.
- 2024 er eisini fyrsta árið, stovnurin arbeiðir eftir árshjóli, soleiðis at allir fundir, stuttfundir, mánaðarfundir, starvsnevndarfundir, málráðsfundir, ráðleggingardagar o.a. verða skrásettir við ársbyrjan.

Vónandi verður hetta við afturvendandi fundum og tiltøkum væl móttikið millum starvsfólkini á Málstovuni. Hetta er ætlað teimum sum amboð at halda hjólini malandi og arbeiðshuginum uppi, tá ið forkvinnurnar ikki eru meira. Starvsfólkini kunna í grundini gera, sum tey vilja, og kenna seg møguliga noydd at vera sín egni sjálvstøðugi leiðari, tí fjórða hvørt ár skifta tey umsjónarfólk, sum kanska als ikki kennir stovnin og arbeiðslagið hjá umsitingini, og eingin hevur skyldu at seta umsjónarfólkið inn í viðurskiftini.

Ivasamt er eisini, hvønn status *umsjónarfólk* hevur í organisatiónini. Skal mann hava LN-nummar ella ikki? Hvørjar skipanir fær mann innlit í og ikki? Hví/hví ikki? Nær hevur mann sum leiðari og sum umsjónarfólk (ella vanligt starvsfólk) ábyrgd av starvsfólki, tí fíggjarliga og kt? *Kann* mann hava ábyrgd av øllum hesum við nevndarsamsýning upp á 3.336,56 kr.? Hesir spurningar áttu at verið svaraðir sum skjótast, tí tað eru løgnar og ótrúverdugar arbeiðstreytir at ganga undir.

Orðingin í stk. 2 í § 9. „*Skrivstova Málráðsins hevur um hendur dagliga virksemið undir umsjón formansins*“ er veik og ógreið, og samsýningin upp á 3.336,56 kr./mnð. uttan skatt, arbeiðsmarknaðargjøld og onnur gjøld bendir hvørki á væntan um at átaka sær nevniverda leiðsluábyrgd ella leggja stórvegis tíðar- og arbeiðsorku í at røkja stovn, starvsfólk og fylgja við føroyska málinum í samfelagnum og lesa og meta ta støðuna upp móti lógini um málráð. Júst hetta, at forfólkini[8] fyrstu árini onga samsýning fingu og síðan eina upphædd, ið er niðan fyri 7 prosent av lønini hjá málfrøðingi á hægsta lønarstigi sambært AKF-sáttmálanum, ger, at eingin kann lasta nøkrum, at arbeiðslagið hjá stovninum, Málráðnum og Málstovuni, var, sum lýst omanfyri. Stovnurin er ongantíð lagaður til skiftið frá Føroyskari málnevnd til Føroyskt málráð. Heldur ikki er hann lagaður til samfelagsins krøv og lógir og er eftirbátur samanborið við fleiri aðrar almennar stovnar.

Samsýning/løn, arbeiðsviðurskifti og umstøður mugu signalera ábyrgd, fakførleika og álvara.

**Tilmæli:** Daglig leiðsla við stjóra fulla tíð. Stjórin kann væl vera áramálssettur, men eigur at sita, soleiðis at skeið hansara umskarar í minsta lagi tvey málráð. Stjórin á Málstovuni skal sjálvandi hava málfrøðiútbúgving í føroyskum, men nýtist ikki at hava granskaraførleikara, heldur skal hann hava hollan fyrisitingarførleika, duga at samskifta við politisku og fyrisitingarligu skipanina omanfyri og hava ans fyri, hvat hendir við føroyska málinum úti í samfelagnum, so hann saman við starvsfólki sínum, kann seta ymiskt í verk. Hann skal vilja og duga at ráðleggja vegna stovnin og arbeiða eftir § 2 í lógini um málráð

[7] *Eisini nevnt „Klarspråk“ í norðurlendskum høpi, sí leinki og § 11 í svensku lógini um greiðmál: "Språket i offentlig verksamhet ska vara vårdat, enkelt och begripligt" og Vad är klarspråk? | Institutet för språk och folkminnen (isof.se)*

[8] *Kravið um, at forfólkini skulu vera málfrøðingar, átti í sær sjálvum at havt virðiliga løn við sær.*

*§ 2. Málráðið hevur til endamáls:*

1) *at røkja, menna og verja føroyska málið,*
2) *at vegleiða, ráðgeva og gera niðurstøður í málspurningum,*
3) *at áseta føroyska stavseting.*

*Stk. 2.* [1] *Málráðið skal harumframt serskilt røkja, menna og verja føroyska teknmálið.*

MÁLRÁÐIÐ

FØROYAPRENT | SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705